

*Hóast HB sjáldan fór úr triðja geari, so høvdu teir ikki stórvegis trupulleikar av EB/Streymi, sum enn eigur fyrsta málið á í Gundadali móti HB*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

HB-EB/Streymur 3-0 (2-0)

# Sama søgan

**Enn einaferð vísti EB/Streymur, at teir veruliga hava eitt kompleks ímóti HB, sum aftur hesaferð vann trygt uttan at ómaka sær serliga nógv**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Heldur ikki í sjeyndu royndini eydnaðist EB/Streymi at fáa stig ella mál, tá teir vitjaðu hjá HB í bestu føroysku fótbóltsdeildini.

Tann sannroyndin, at EB/Streymur hevur okkurt slag av kompleksi í Gundadali, tá HB er mótstøðuliðið varð í øllum førum ikki avsannað sunnudagin, tí hóast úrslitið varð ein sannførandi sigur, so var talan tó ikki um eins sannførandi spæl frá meistarunum. Men tað kravdist so heldur ikki.

Fyrsta veruliga ábendingin um, at talan aftur hesaferð kundi gerast um ein av hesum dystunum, har EB/Streymur kanska hevði møguleikarnar, men ikki neyðuga hepnið, kom longu eftir fáum minuttum, tá Sonni L. Petersen bráðliga slapp ímillum sløsut HB-verjuspæl, men hann var ikki nóg kaldur, tá Bárður Johannesen kom ímóti.

Hinvegin vísti HB eisini, at teir væl kundu koma framat møguleikum, tá teir í næsta álopinum vóru heilt nær við at skora eftir horna.

Effektivitetur framman fyri málinum hevur verið eitt av fremstu eyðkennunum hjá HB seinnu árini, og tá teir eftir átta minuttum aftur fingu møguleikan, fór hesin ikki fram við borðinum uttan víðari. Tað tóktist annars, sum skuldu gestirnir sleppa við skrekkinum, tá Magnus Poulsen í málinum fekk hálvbjargað royndini frá Tór-Ingar Akselsen, men við handaru stong var Jákup á Borg skjótur at fylgja upp, og hann smekkaði bóltin í tóma málið.

Hetta tók líka sum nakað av luftini úr dystinum, og tá HB um miðjan hálvleikin aftur skoraði, punkteraði spenningurin fullkomuliga. Talan var annars um mest sum heilkiksað skot, tá Rókur royndi seg av brotsteigarmarkinum, men Hans á Lag var skjótur á staðnum, soleiðis at kósin á bóltinum kundi rættast móti málinum.

### Kompleksið

Og so var alt í roynd og veru avgjørt. Størsta undirhaldsmomentið, tað sum eftir var av dystinum, mundi vera, hvussu sjónligt kompleksið hjá gestunum viðvíkjandi málskjóting var.

Fleiri ferðir var talan um heilt góðar møguleikar, sum bæði kundu og skuldu kastað mál av sær, men tað gjørdist ongantíð meira enn næstan. Egil á Bø stútaði beint fyri steðgin hornaspark niður í vøllin og upp um málið. Beint eftir steðgin kendu gestirnir seg væl og virðiliga snýttar fyri brotsspark, tá Sorin varð feldur, og heldur ikki eydnaðist at skora, tá Sonni L. Petersen og Hans Pauli Samuelsen hvør í sínum lagi gjørdust leysur, ella tá Gert og Marner høvdu góðar møguleikar eftir horna.

Ikki tí. Hóast møguleikarnar til gestirnar, so tóktist sigurin hjá HB ongan tíð av álvara at vera í vanda. Fyri tað allar mesta sat áskoðarin við kensluni av, at HB gjørdi tað neyðuga og ikki so øgiliga nógv meira. Sum um teir høvdu eitt eyka gear at taka til, skuldi tað verðið neyðugt.

Og móti dystarenda eydnaðist so eisini HB at sementera sigurin. Tað sá annars ikki út av so øgiliga nógvum, tá Bárður Mortansson við øgiligum rópi fór um koll uttan fyri brotsteigin, men fríspark varð so dømt. Og út 16,5 metrum er hetta meira enn trýkvartur møguleiki, tá Rasmus Nolsøe er á mótstøðuliðnum.

Tvøramaðurin hjá HB læt heldur ikki møguleikan fara framvið, men langaði bóltin flatt í handara síðunet, soleiðis at allar seinasti ivin um stigini hvarv.

Við dystinum hevur HB í fyrstu atløgu lagt seg einsamalt á odda í bestu deildini. Gaman í hava teir spælt ein dyst fleiri enn B36, sum bara er trý stig aftanfyri, men sum onkur klókur maður hevur sagt, so er betri at hava fingið stigini, enn at hava dystirnar til góðar.

Hjá EB/Streymi var talan um fyrsta tapið, síðani teir seinast vóru í Havnini. Skal formurin síðani tá nýtast sum barometur, so er helst einki at ivast í, at samansetta liðið skjótt aftur fer at klintra upp eftir talvuni. Men skal dysturin sunnudagin nýtast sum barometur, so er ikki nógv at fara eftir. Verður sæð burtur frá Hans Paula Samuelsen, sum tað fleiri ferðir glógvaði í, so var talan fyri tað allar mesta um planleyst gúppari í vónini um, at Sorin kundi gera okkurt einsamallur.

Tað kundi hann onkra tíðina eisini gera, men tá sjálvt teir mest upplagdu møguleikarnir móti einum hálvsovandi HB-liði ikki geva mál, so er ilt at ímynda sær, hvaðani stigini skulu koma. Men tað man nú ikki fara at verða heilt so galið í øllum dystum kortini. Tað hava seinastu árini í øllum førum borið boð um.

## Fakta um dystin

**HB-EB/Streymur 3-0 (2-0)**
**1-0:** Jákup á Borg, 8.
**2-0:** Hans á Lag, 21.
**3-0:** Rasmus Nolsøe, 82.
**Dómari:** Lassin Isaksen. Ikki alt ov sannførandi.
**HB:** Bárður Johannesen - Hallur Danielsen, Jóhannis Joensen, Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen - Jákup á Borg (Svenn Jacobsen, 72.), Rúni Nolsøe, Kári Nielsen (Emil N. Leifsson, 85.), Tór-Ingar Akselsen - Hans á Lag (Bárður Mortansson, 61.), Rókur Jespersen
**GK:** Kári Nielsen, 63.
**EB/Streymur:** Magnus Poulsen - Bárður Olsen, Andrzej Pacek, Egil á Bø, Gert Hansen - Hans Pauli Samuelsen, Knút Vesturtún, Marni Djurhuus (Finnbjørn Zachariassen, 72.), Esmar Eiðisgarð (Jákup Martin Joensen, 46.) - Sonni L. Petersen (Teitur Joensen, 69), Sorin Anghel